# Les til verkfrøðing

Í summar verður tikið upp til tvær verkfrøðinga-útbúgvingar á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Tað eru bachelorútbúgvingarnar í kolvetnis- og ravmagnsverkfrøði (*"Oljuverkfrøði" og "Elektro- og KT-verkfrøði"*).

Útbúgvingarnar eru frá í summar styttar, so tær nú taka 3 ár ístaðin fyri sum higartil 31/2 ár. Hetta samsvarar rákinum uttanlands, har bachelorútbúgvingar verða skipaðar sum 3 ára universitetsútbúgvingar.

Útbúgvingarnar eru skipaðar í modulum, og tí ber eisini til at melda seg til og taka prógv í einstøkum lærugreinum. Meir fæst at vita um útbúgvingarnar á heimasíðuni www.nvd.fo.

**Upptøkutreytir**
Fyri at sleppa inn til verkfrøðilestur krevst støddalis- og evnafrøði á ávikavist stigi A, B og C. Aðrar fortreytir (t.d. maskinmeistaraútbúgving) kunnu koma upp á tal eftir nærri meting í hvørjum einstøkum føri.

**Umsóknarbløð**
Umsóknarbløð fáast á heimasíðuni www.nvd.fo ella við at venda sær til Náttúruvísindadeildina.

**Stakgreinalestur innan lívfrøði**
Í heyst verður eisini undirvíst í hesum lærugreinum innan bachelorútbúgving í lívfrøði: Lívevnafrøði, Arva- og mýlislívfrøði, Almenn smálívfrøði, Kyknulæru og Vistfrøði á landi. Til ber at melda til seg hesar lærugreinir.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til Náttúruvísindadeildina, Postboks 2109, FO 165 Argir. Umsóknarfreistin er 1. juli 2005. Boð um upptøku verða givin í seinasta lagi 15. juli 2005.

Meir fæst at vita um lestrarmøguleikarnar við at vitja á Náttúruvísindadeildini í Nóatúni 3 í Tórshavn ella við at ringja á telefon 352550.

# TFT útbúgving

**Farið verður undir TFT-útbúgving í Føroyum, um nóg nógv tekna seg.**

**Fundur um TFT-útbúgvingina verður í Slættanesgøtu 5, 26. juni kl, 19.00**

**Tilmelding á tel 21 87 77 ella 31 88 21**

**Avmarkað pláss**

TFT er ein serstakur og øðrvísi viðgerðarháttur enn teir vit eru von við.

Lesi meira um TFT-viðgerðarhættir á:

www.tftdanmark.dk

Sosialurin

RÆTTING:

Gøtu Kommuna

# Húsavørður

Til at røkja bygningarnar hjá kommununi og taka sær av viðlíkahaldi, verður søkt eftir húsavørði.

Starvsøkið fevnir um viðlíkahald av øllum bygningum og ognum hjá kommununi. Harafturat kann roknast við nakað av fyrifallandi arbeiði á ymsu stovnunum hjá kommununi.

Tað er ein treyt, at umsøkjarin hevur viðkomandi handverksliga útbúgving. Umsøkjarar við royndum frá líknandi størvum hava fyrimun. Vit vænta, at húsavørðurin er fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni. Tað er ein treyt, at umsøkjari hevur koyri-kort til bil.

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna á tlf. 44 10 12.

Umsóknir saman við viðkomandi skjølum og møguligum viðmælum, skulu verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi **hósdagin 7. juli 2005**.

Umsóknirnar skulu sendast til:

**Gøtu Kommunu**
við Gjónna 2
Postboks 40
511 Gøtugjógv

# Søkt verður eftir pedagogi til

## Frítíðarskúlan í Runavíkar kommunu

Frítíðarskúlin heldur til í Gomlu læknahúsinum á Heiðavegi 22 Saltangará. Frítíðarskúlin er normeraður til 37 børn.

Starvið, sum er 20/25 t. v., verður flokkað á lønarstigi 10-16 og er tíðaravmarkað frá 10. august 2005 fram til 31. juni 2006.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- er áhugaður at arbeiða við størri børnum
- er íðin, nærlagdur og álítandi
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur umsorgan og virðing fyri børnum

Starvið verður sett 10. august ella eftir nærri avtalu.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Jastrid Weihe, leiðara á tlf. 448594 lok 12 ella 216630.

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndum, skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mikudagin 6. juli 2005.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
FO-600 Saltangará

RÆTTING:

Gøtu Kommuna

# Skrivstovunæmingur

Til kommunuskrivstovuna, verður søkt eftir skrivstovunæmingi.

Umsøkjari við FHS ella HH prógvi hevur fyrimun. Vit vænta okkum ein næming, sum er fyrikomandi, er vanur at arbeiða við teldu, hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Talan er um eitt fjøltátta arbeiði, har møguleiki er fyri at nema sær kunnleika innan almenna fyrisiting, bókhald, v.m.

Fleiri upplýsingar um fáast við at venda sær til skrivstovu kommununnar.

Seinasta freist at senda inn umsókn saman við prógvum og møguligum ummælum er **fríggjadagin 15. juli 2005**.

**Gøtu Kommuna**
við Gjónna 2
Postboks 40
511 Gøtugjógv

# Útbjóðing

Vegna Kirkjuráðið í Gøtu verður við hesum boðið út í almenna lisitatión, arbeiðið í samband við umvæling av gomlu kirkju í Norðragøtu.

Arbeiðið fevnir í stuttum um skiftan av flagtekju og klædning á torninum.

Lisitatiónin verður á Sp/F Teknistovuni í Gøtu týsdagin 19. juli 2005 kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast til í seinasta lagi týsdagin 28. juni kl. 12.00. við at gjalda kr. 5.000,- í veðhaldi á konto nr. 6460-165 7404 í Føroya Banka.

Veðhaldi verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið verður aftursent í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

**Sp/F Teknistovan**
v/Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen
Ráðg. byggifrøðingar
FO-510 Gøta
Tlf. 442105 - Fax. 442107
e-mail: klement@post.olivant.fo

# Lærlingur

Vit sóknast eftir einum røskum lærlingi at byrja sum skjótast.

Ein við SIT ella líknandi kann hava fyrimun.

Nærri fæst at vita við at ringja til okkara ella støkka inn á gólvið.

**Hógv Handilsvirki**
Oman á Sand 15
660 Søldafjørður
Tlf. 441963 ella 741963
hogv@hogv.fo